VIÐMERKINGAR

# Fulltíðarstarv

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*

Tá ið tú týsdagin fert at velja tína rødd út í heim, so hevur tað týdning, at tú hugsar um, at røddin eisini skal hoyrast í Fólkatinginum.

Eingin kann røkja tveir tingmannasessir í senn í hvør sínum landi til lítar. Bæði sambandskvinnan og tjóðveldismaðurin á Fólkatingi hava hesi seinastu fýra árini verið bæði løgtingsmenn og fólkatingsmenn.

Tann føroyski fólkatingslimurin fær góða løn og góðar umstøður - tað forpliktar! Hvat høvdu føroyingar sagt, um vit rindaðu fulla løn og eftirløn til tveir danir í Løgtinginum, og at teir ongantíð vóru at hitta.

Tí hevur tað týdning, at tú velur ein flokk, sum vil taka fólkatingsarbeiðið í álvara. Tað vil Javnaðarflokkurin! at tú velur eitt fólk, ið vil arbeiða í Fólkatinginum burturav, og sum dagliga og áhaldandi vil arbeiða fyri at styrkja støðu Føroya á altjóða leikpallinum.



VAL05

Vegna Javnaðarflokkin bjóði eg meg fram til at taka hesa uppgávu uppá meg. - At røkja fólkatingssessin sum eitt fulltíðarstarv.

# Eftir ódn er brúk fyri linna

**Jonhild Andreasen Nielsen**
*Valevni Javnaðarfloksins*

Hann lá og hevði ligið við óveðri, vindi og stormi, nú so at siga allan samlan seinnapartin av heystinum og út á hálvan veturin. Ættarskifti var í heilum; hann mól og mól, var eitt sindur vestligur í dag, so aftur lækkaður niður aftur við ódnarstormi í morgin. Ein lítil linni var onkutíð uppímillum, men tung og trong luft og brimgangur í vestursjónum, sum hoyrdist eins og ein kvald, ónd dunan úr jørðini og ljóðaði fram fyri alt og elti teg, hvar tú var, inni sum úti, heima við hús sum burtur í bø ella haga.

Soleiðis skrivar Martin Joensen í søguni Ein Bygdarmynd. Men hvat hevur hetta við fólkatingsval at gera?, spyr gløggi lesarin.

Jú, lýsingin er sum tikin úr gernadisdegnum hendan veturin, vit kenna okkum aftur, og tað er umráðandi í øllum viðurskiftum.

Hinvegin kann lýsingin eisini førast yvir á politikkin. Tey skiftandi rákini og tær skiftandi umboðanirnar á fólkatingi; so ymisksar sum veður og vindur; stundum brimgangur og dun og síðani ein linni.

At vit kenna okkum aftur, eisini í umboðanini á fólkatingi, er umráðandi, tí arbeiðið má vera rótfest í veruleikanum hjá okkum føroyingum. At ættir og rák skifta, eins og eyðkennini við teimum umboðum, ið umboða Føroyar á fólkatingi, tað er eisini eitt slag av náttúrulóg.

Men eftir ódn er brúk fyri einum linna.

Javnaðarflokkurin stendur fyri semjusøkjandi samstarvi, ikki konfrontatiónum. Ein flokkur, sum er til at tosa við og sum vil tosa við øll.

Ásannandi, at Føroyar ikki eru - og ikki hava verið - avbyrgdar, er neyðugt at trína á altjóða pallin og at fáa í lag samstarv og avtalur. Javnaðarflokkurin arbeiðir fyri at fáa í lag altjóða samstarv og betri ES avtalu. Fullgyldan limaskap í Norðurlandaráðnum. Størri ábyrgd framhaldandi og víkað samstarv við onnur lond. Størri ábyrgd á altjóða pallinum. Javnaraflokkurin er best egnaður at røkja føroysk áhugamál. Javnaðarflokkurin; vit mynda framtíðina. Úti og heima.



VAL05

# Fólkatingsvalið

**Bjørg Joensen**
*Javnaðarflokkurin*

- Vit skulu víðka okkara sjálvsavgerðarrætt
- Vit skulu víðka okkara uttanríkispolitisku heimildir
- Vit skulu bera boðskapin fram, so danir skilja føroyingar og okkara avgerðir
- Vit skulu kunna um fólkatingsarbeiðið í Føroyum
- Vit skulu samstarva við allar flokkar á fólkatingi
- Okkara umboðan á fólkatingi er ikki eitt tilboð men ein skylda.



VAL05

# SUM TÍN DAGUR SKAL TÍN STYRKI VERA !

**tórbjørn jacobsen**



VAL05

Sjálvstýrisstríðið er um aldur við gamla slupp. Danska ræðið á Føroyum er nú líka treyst sum ringasti pumpuroykur. Og síðani betongsentralurin ABC settist við radiatorarnar, hevur tað staðið við og versnað. Hetta hjáputrið, kolonialistiska leivdin, tveir av 179 tingmonnum, skal nú veljast. Allir ætla at sita sum mýrivengur, at spæla á eina evarska lítla munnhørpu, á aftasta beinki í donskum flokki, uttan Tjóðveldisflokkurin, ið fer á danating við greiðari stevnu. Ætlar at sita á fyrstu parkett, í egnum tingbólki, og stríðast fyri føroyskum tjóðarrættindum. Halda fram á slóðini hjá Erlendi Patursssyni og Norðuratlantsbólkinum.

Framundir løgtingsval tosa øll um val til evsta vald landsins, men við ára millumbili fáa vit áminningina um, at tað finst ein polisk makt, sum er omanfyri. Fólkatingið. Evsta valdið í øðrum landi.

Tjóðveldisflokkurin hevur hetta seinasta valskeiðið staðið sum ein ljósboya, sum ein ýtingarboya, á Norðhavinum. Glampað í morgunguvuni og varpað greið signalir út í ytstu krókar. Starvið heldur fram eftir valið týsdagin.

Ýtið er skeytið til matrikkulin. Vit fara at seta fram uppgreiðandi fyrispurningar. At leggja fram uppskot, ið gagna. At ávirka danskar politikkarar, í royndini at fáa teir at skilja, at frumburðarrætturin liggur her heima — og ikki í Keypmannahavn. At upplýsa danska fólkið um einastu gongdu leiðina á politiska akrinum. At hjálpa fólki. Og ístaðin fyri at standa á seiðabergi í onkrum hissini donskum flokki fara vit at dríva politiskan útróður. Stríðið verður avgjørt í egningarskúrunum og tykkara sáru lógvar seta einastu føroysku røddina — á danska framherjan aftur.

Bjølgurin í donsku fóðurpatrónini pumpar enn. 630 milliónir standa ímillum danskt heimastýri og føroyskt fullveldi. Har stendur stríðið. Vit ætla okkum at standa rimmarfastir á imperialistisku líktornunum — fram í treytaleyst tjóðarfrælsi. Og onki er at óttast. Tí sum tín dagur — skal tín styrki vera. Vit síggjast á Danatingi.

# Óli Breckmann fer lætt um sannleikan

**Jákup Lindenskov**



Tá Óli Breckmann uppaftur til fólkatingsvalið hesaferð ikki er sannur í málinum um krígspensjónina, havi eg hesar viðmerkingar:

Óli Breckmann slepti hesum máli púrasta, tá hann hevði fingið bræv frá Esther Winter Andersen, táverandi sosialministara (V). Tað var aftan á, at vit høvdu havt fund við sosialministaran 10. apríl í 1991. Tað frættist einki aftur frá hesum fundi. Men so sigur hon frá í brævi til Ó. B., dagfest 23. juli 1991 m. a. : »De færøske fiskere kan ikke generelt henføres under loven. Det ville være i strid med loven. Hvis det skal ændres, er det nødvendigt med lovændring.

Jeg synes ikke, at der er fremkommet noget nyt, der giver grundlag for en sådan ændring, og jeg ville også finde det meget uheldigt med en lovændring, der på dette sene tidspunkt henførte en ny persongruppe under loven. Det håber jeg, du har forståelse for.«

Eg frætti einki um boðini, Óli hevði fingið, men tá eg so fekk frænir av, at einki meira fór at verða gjørt við málið, hvørki av stjórnini ella Óla Breckmann, setti eg meg beinleiðis í samband við samstarvsmenn mínar í Javnaðarflokkinum á tingi - og tá kom ferð á málið.

Fekk undirtøku frá Javnaðarflokkinum - málið um krígspensjónina fyri føroyskar fiskimenn varð sett á listan hjá Socialdemokratunum sum treyt fyri at ganga inn fyri fíggjarlóg Fólkatingsins 1992.

Í skjalinum um »Aftale om finansloven for 1992 mellem Socialdemokratiet, Det Konservative Folkeparti, Venstre, Centrum Demokraterne, Det Radikale Venstre og Kristeligt Folkeparti, er der indgået aftale om finansloven for 1992« stendur m. a. í 9. punkti:

»Tilskudsordningen vedrørende erstatning til besættelsestidens ofre udstrækkes til også at gælde færøske søfolk.«

Eftir hetta varð ríkisstjórnin noydd at seta fram lógaruppskot í Fólkatinginum um málið.

Eingin krígspensjón hevði verið fyri føroyskar fiskimenn, um málið ikki varð hálað ígjøgnum av Javnaðarflokkinum á Fólkatingi. Tá føroyski javnaðarmaðurin á Fólkatingi tók málið uppaftur, aftan á at borgarliga stjórnin hevði lagt málið til viks. At málið varð samtykt av samdum Fólkatingi var av tí, at flokkarnir høvdu gjørt semju um málið.

Eg skilji ikki framferð Óla Breckmans - at fara so lætt umsannleikan.